**Flipover-stafet**

Flipover-stafet er ein stuttlig og øðrvísi CL háttur, sum bæði inniheldur endurtøku, fysiskan aktivitet og hugflog
Sett verða upp Flip-over ørk á veggin í flokkinum, eitt til hvønn bólkin og pláss skal vera fyri at hvør bólkur hevur pláss til at stilla seg í rað uml. tveir metrar burtur frá.

A: Uppgávan er at minnast so nógv sum til ber frá tí evninum, sum júst hevur verið arbeitt í gjøgnum
B: CL-hátturin kann eisini verða nýttur til hugarok

1. Fremsti næmingurin í hvørjum raði hevur ein spritt penn
2. Tá ið lærarin gevur boð, skundar næmingurin sær yvir til Flip-over arkið og skrivar tað týdningarmesta, sum hann/hon kann koma í tankar um (ella uppskot til hugarok)
3. Síðani rennur næmingrin aftur til raðið og gevur pennin til tann næsta í køini sum skundar sær av stað…
4. Hildið verður fram til bólkurin hevur skrivað alt tað, sum tey minnast upp á pappírið
5. Loyvt er at nýta súmbol, pílar osfr.

Umframt til hugarok, kann hesin CL verða nýttur til uppsummering og afturíafturtøku repititión av øllum sløgum av vitan.
Av tí at tað skal verða skrivað skjótt, verður tað, sum skrivað verður, ikki so snøgt. Men av tí at fokusið og intensiteturin er høgur kemur væl burtur úr. CL hátturin ljóðar kanska eitt sindur fjasutur, men tey góðu kognitivu, fysisku og emotionellu elementini gera at tað mesta kemur við - lítið verður gloymt.

Ikki kapping: Umráðandi er at gera sær greitt, at hóast CL hátturin hevur orðið “stafett” í sær, so snýr tað seg ikki um eina kapping - tað snýr seg ikki um, at ein bólkur skal vinna á einum øðrum. Royndirnar eru, at næmingarnir kenna seg at kappast við seg sjálvan um at minnast so nógv sum gjørligt og tað er tað stuttliga.

Fyri at tryggja, at allir næmingarnir ava fingið alt við royna CL-háttin: stand og být ella trý til te